# Tveir tilburðir av herverki og ein rúsdrekkakoyring í Suðuroy

Tveir tilburðir av herverki eru um vikuskiftið meldaðir til løgregluna í Suðuroy. Onkur persónur hevði fríggjanáttina skorið øll fýra dekk upp á tveimum bilum, sum stóðu í túninum hjá eigaranum á Tvøroyri. Løgreglan har hevði illgruna til ein mann, men tann illgrunin er sleptur aftur. Eina aðrastaðni á Tvøroyri høvdu nakrir smádreingir slept fýrverki, einum strúkara, inn í eina gongd á einum húsum um klokkan 21 fríggjakvøldið. Teir eru funnir, og hava fingið eina átalu frá løgregluni fyri herverkið, tá talan skjótt kundi verðið um at eldur kom í. Seinnapartin fríggjadagin, um klokkan 17.30, varð ein tikin fyri rúsdrekkakoyring í Hvalba.



# Bilur fór útav á Gálganum við Øravík

Um vikuskiftið fór ein bilur útav á Gálganum við Øravík. Orsøkin til at bilurin fór útav var, at tað var hálka á staðnum. Bilurin fór illa, men talan var ikki um nakran persónsskaða. Førarin var einsamallur í bilinum, og slapp snikkaleysur frá hendingini. Løgreglan í Suðuroy upplýsir, at maðurin var heppin í óhepninum. Sera høgt er niðurav har og var bilurin farin eitt lítið sindur longri, var hann farin á sjógv, og talan kundi tá skjótt verðið um eina vanlukku.

# Havi ikki tosað niðrandi um tjóðveldi

**Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, sigur seg ikki hava tosað niðrandi um Tjóveldi á landsfundinum hjá flokkinum**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað undrar formann Javnaðarfloksins Jóannes Eidesgaard almikið at Jógvan Arge, sitandi varaborgarstjóri í Havn, biður um time-out frá samgonguni við Javnaðarflokkin. Ikki minst, tí hann leggur formann floksins undir at hava tosað niðrandi um Tjóðveldi.

- Sjálvandi greiddi eg landsfundinum frá, hví CHE- samgongan slitnaði. Í hesum sambandi undirstrikaði eg, at álitið á Høgna Hoydal var rokið. Samstundis legði eg stóran dent á, at samstarvið við tingmanningina og landsstýrisfólkini var fyrimyndarligt, sigur Jóannes Eidesgaard, sum ikki skilur, hví Jógvan Arge nú kemur upp við hesum.

Jóannes Eidesgaard undrast eisini á, at Jógvan Arge brúkar hetta høvi til at samanbera landspolitikk við kommunalpolitikk.

- Tað skilji eg ikki, tí hvørki Høgni Hoydal ella eg hava nakað sum helst við býráðssamstarvið í Tórshavnar Kommunu at gera. So her dregur Jógvan Arge eina skeiva niðurstøðu.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, finst at formanni Javnaðarfloksins, tí hann á landsfundi floksins fegnaðist um góða úrslitið á kommunuvalinum. Til hetta sigur Jóannes Eidesgaard, at:

- Nú var tað Javnaðarflokkurin, sum hevði landsfund. So sjálvandi nevni eg fína valúrslitið, sum flokkurin fekk á kommunuvalinum. Álvaratos, tað er bara veruleikin, sigur Jóannes Eidesgaard, sum er á veg til Íslands.

Jóannes Eidesgaard hevur onga viðmerking til, at Jógvan Arge eisini heldur Heðin Mortensen taka sær ov nógvan heiður fyri politikkin hjá samgonguni í býráðnum.

- Eg haldi, at hetta er at skapa eitt problem, sum ikki er til, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins.

# Arge trekkir í land

**Jógvan Arge er argur inn á Javnaðarflokkin og Heðin Mortensen. Tí heitir hann á floksfelagar sínar um at taka nýstovnaða samgongusamstarvið upp til nýggja umhugsan**



*Jógvan Arge hevur tvey hjartasuff, nú samgongan í Havn er skipað. Javnaðarflokkurin hevur niðrað Tjóðveldi og Heðin Mortensen tekur sær ov nógvan heiður*

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Blekkið á samgonguskjalinum millum Tjóðveldi og Javnaðarflokkin er ikki meira enn tornað, nú Jógvan Arge, sitandi varaborgmeistari, biður um time-out frá samgongusamstarvinum, sum eftir ætlan skuldi byrjað 1. januar. Hetta ger hann í lesarabrævi, prentað í blaðnum í dag.

Sambært Jógvan Arge, sitandi varaborgarstjóra, er orsøkin tann, at formaður Javnaðarfloksins á landsfundinum um vikuskifti talaði niðrandi um Tjóðveldi. Eisini fýlist Jógvan Arge á, at Heðin Mortensen tekur sær heiðurin av øllum avrikum, sum samgongan hevur fingið ígjøgnum hetta seinasta valskeiðið.

- Javnvágin í einum møguligum framhaldandi samarbeiði er so markant, at eg og mong við mær hava ilt við at síggja nakra rímiligheit í at halda fram, uttan at Tjóðveldi fær tryggjað sær eina munandi betri balanseraða støðu mótvegis Javnaðarflokkinum og borgarstjóranum, sigur Jógvan Arge. Í hesum sambandi vísir hann eitt nú á, at seinast flokkarnir báðir gjørdu av at skipa samgongu, fekk minni flokkurin leiðsluna. Hetta var, tá ið Heðin Mortensen bleiv borgarstjóri.

Í niðurstøðuni í brævinum sigur Jógvan Arge, at tað hóvar honum lítið at fara í samgongu aftur við Javnaðarflokkin í Tórshavnar býráð undir teimum treytum, sum í løtuni liggja í kortunum. Eisini mælir hann floksfeløgum sínum um at taka samstarvið við Javnaðarflokkin býráðnum upp til nýggja umhugsan.


Neyðugt við time-out

# Samgongan eigur æruna

**Heðin Mortensen gevur ikki Javnaðarflokkinum heiðurin fyri góða valúrslitið til kommunuvalið. - Samgongan vann valið, sigur hann**

Heðin Mortensen er onga løtu í iva um, at stóra framgongdin hjá honum á kommunvalinum, hevur einki við Javnaðarflokkin í løgtinginum at gera. Við Sosialin sigur hann, at greiður skilnaður skal vera millum kommunal- og landspolitikk.

- Javnaðarflokkurin skal ikki taka æruna av góða úrslitinum á kommunalvalinum, tí tað er samgongan millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldi, sum vann valið, sigur borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, sum ikki skilur, hví Jógvan Arge nú blandar alt saman.

- Vit hava havt eitt fyrimyndarligt samstarv, sum eg vóni kann halda fram, sigur hann.

# Bogi stendur sum kánus

**Stóri atkvøðuslúkurin hjá Tjóðveldi á býráðsvalinum í Havn, Bogi Andreasen, skilur púrt onki, nú Jógvan Arge biður um time-out**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosilurin.fo*



*Heðin Mortensen og Bogi Andreasen valkvøldið, tá friður enn valdaði*

Tað er ein ikki sørt skakkur Bogi Andreasen, Sosialurin fær í hornið í morgun. Eftir hansara fatan, er onki broytt í mun til samgonguavtaluna, sum Tjóðveldi og Javnaðarflokkurin undirskrivaðu valnáttina. Eftir tí avtaluni skal Heðin Mortensen halda fram sum borgarstjóri, meðan Bogi Andreasen, sum fekk 489 atkvøður, sjálvur verður varaborgarstjóri.

Bogi Andreasen sigur, at fráboðanin hjá Jógvan Arge má standa fyri hansara egnu rokning.

- Tað eg veit av, hava vit verið sera væl nøgd við avtaluna, og tað hevur verið sera positivt higartil. Eg veit ikki, hvat Jógvan Arge meinar við og haldi tað vera sera óheppið, at hann úttalar seg fyri allan flokkin. Men hetta mugu vit taka upp innanhýsis, sigur Bogi Andreasen, sum eisini hevur tosað við Jákup Símun Simonsen, nývalda tjóðveldisumboðið, í morgun. Heldur ikki hann visti av nøkrum, fyrr enn Jógvan Arge kom út við áheitanini um time-out.